# Lærarar kanska aftur í verkfall

*Træta hevur longu tikið seg upp um semjuna, sum endaði læraraverkfallið fyri sløkum trimum vikum síðani*

ÁKI BERTHOLDSEN

Karsten Hansen, Høgni Hoydal og Elsa Birgitta Petersen vóru ikki leingi í paradísi.

Tað er ikki meiri enn slakar tríggjar vikur síðani, at tey skrivaðu undir eina avtalu, sum fekk enda á tí meiri enn tveir mánaða langa læraraverkfallinum.

Men tað er longu komið vátt í reiðrið aftur.

Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið eru nevniliga longu blivin ósamd um semjuna, sum hátíðarliga varð undirskrivað á midnátt sunnukvøldið 30. apríl.

Hetta er hent, hóast allir partar søgdu í Sosialinum beint aftaná, at semjan varð undirskrivað, at tey høvdu fult álit á semjuni og at hon ikki fór at elva til ósemju, tá ið hon skuldi setast í verk.

Men tað er altso júst tað, sum longu er hent, ikki meiri enn gott 14 dagar aftaná, at semjan varð undirskrivað.

Og ósemjan, sum nú hevur tikið seg upp kann í ringasta føri enda við, at lærararnir fara at leggja arbeiðið niður einaferð afturat.



*Semjan ímillum Lærarafelagið og Landsstýrið helt ikki leingi. Tað er ikki meiri enn slakar tríggjar vikur at læraraverkfallið endaði, men nú hóttir ein ósemja um orðingar í semjuni við at leggja skúlan lamnan einaferð afturat.*

### Onki løgið

Tað er ógvuliga trupult at fáa partarnar í málinum at gera viðmerkingar til málið.

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, sigur heilt stutt, at hon hevur ongar viðmerkingar, beint nú,

– Men tað munnu nokk fara at koma onkur tíðindi seinni, leggur hon afturat

Heldur ikki Tummas Magnussen, leiðari á lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum, vil gera nakrar viðmerkingar.

Men hann sigur, at tað er onki óvanligt, um ósemjur taka seg upp um snøklar í einari semju, ið er gjørd um mál, sum tveir partar eru ógvuliga ósamdir um frammanundan.

–Ein semja er oftani ein neyðloysn, sum verður gjørd eftir langar samráðingar. Ofta verður talan um heldur ullintar orðingar, sum partarnir leggja hvør sín týdning í. Og tá er tað onki løgið í, um okkurt er eitt sindur ógreitt, tá ið semjurnar skulu setast í verk.

Men nakra ítøkiliga ósemju ímillum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið, vil hann ikki gera viðmerkingar til.

### Ikki nakar trupulleiki

Tað er bara Høgni Hoydal, landsstýrismaður í skúlamálum, sum vil viðganga, at ósemja hevur tikið seg upp.

Men hann væntar tó ikki, at talan verður um nakran trupulleika.

–Vit hava skrivað undir eina semju og tað eru greiðar mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram, um ósemjur stinga seg upp.

Hann sigur, at Lærarafelagið hevur undirskrivað eina høvuðsavtalu, har tað verður skorið út í kortið, hvussu farast skal fram, tá ið ymiskt mál taka seg upp.

Sjálvur heldur hann, at semjan er púra greið.

– Í hvussu so er á tí seinasta samráðingarumfarinum, varð tosað opið og greitt um, hvat semjan bar í sær og, hvat hon kom at kosta.

–Men hevur ein ósemja tikið seg upp, mugu partarnir seta seg saman at loysa málið, sigur Høgni Hoydal.

Partarnir, sum hann meinar við, eru Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið, tí hetta er ikki eitt mál, sum liggur undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum.

Og hann hevur eisini skilt, at farið er undir arbeiðið at finna semju.

### Hótta við verkfalli

Ósemjan ímillum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið er um, hvussu onkur orðing í sáttmálanum skal tulkast.

Talan er um ásetingina um ráðleggingartímar, sum partarnir eru ósamdir um.

Í semjuni ímillum Lærarafelagið Landssýrið stendur m.a., at „hjá teimum, sum hava felags ráðlegging, verður ein undirvísingartími settur av til felags ráðlegging.

Uppí ráðleggingartíman verður ikki roknað fyrireiking. Hetta ber í sær, at hálvur tími í niðurskurði verður tikin av fyrireikingartíðini"

Og tað skilst, at tað er hesin hálvi tímin, sum ósemjan stendur um.

Lærarafelagið hevur boðað lærarunum frá ósemjuni.

Og samstundis hevur felagið boðað frá, at fæst ikki ein loysn á málinum, er onki annað at gera, enn at leggja arbeiðið niður aftur.

Høgni Hoydal heldur ikki, at Lærarafelagið kann fara í verkfall av hesi orsøk.

– Tá ið ein avtala er undirskrivað og sett í gildi, kann annar parturin ikki bara leggja arbeiðið niður, tí at

– Tað er júst eini støðu, sum hesari, sum høvuðsavtalan skuldi forða fyri, at vit komu í.

–Tað vildi eisini verið heilt burturvið at lagt arbeiðið niður aftaná alla ta tíð og alla ta orku, sum vórðu løgd at fáa semju ílag, sigur Høgni Hoydal.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur ikki verið at hitta.

# Sýna fram í Billedværkstedet

*Leygardagin letur upp framsýning í Danmark, har føroysk listafólk sýna listaverk síni fram á Billedværkstedet*

DAGFINN OLSEN

Leygardagin 20. maj letur upp listaframsýning í Billedværkstedet í Brovst. Við eru føroysk listafólk, umframt danskur málari, ið hegnisliga lýsir grønlendsku náttúruna.

Sagt verður um føroyingarnar á sýningini, at talan er um 8 sermerktar og litríkar føroyingar.

Billy Sjur Ohlsen og Torbjørn Olsen hava staksýningar, meðan Zacharias Heinesen, Eyðun av Reyni, Kári Svensson, Olivur við Neyst, Amariel Norðoy, Bárður Jákupsson og Aggi Asgerð Asgeirsdóttir hava nakrar myndir við.

Tey bæði Jonna og Ib Hugo Adelborg, ið hava Billedværkstedet meta, at listafólkini øll eru í listarligari menning og við størri og størri tryggleika hava tamarhald á sínum listarligu framførslum.

Latið verður upp leygardagin klokkan 14 og opið er síðani dagliga frá klokkan 13 til 17.

Tá latið verður upp leygardagin, verður. m.a. Torbjørn Olsen til staðar og Rosa á Rógvu fer at lesa upp yrkingar eftir William Heinesen.

Umframt hesa sýning, eru eisini onnur verk at síggja.

Standmyndir og kermisk list er at síggja í aldingarðinum og her eru umboðað Aase Haugaard, Anne Nielsen og Marianne Stenholdt Bork.

Framsýningin, har føroysku listafólkini eru við, heldur fram til tann18. juni.




*Leygardagin eru 8 føroysk listafólk umboðað á sýning í Danmark*






# Starvsfólk til Kaupthing Føroyar

**Hin 1. mars 2000 varð Kaupthing formliga virkið í Føroyum. Síðan hava Føroya Sparikassi og Kaupthing hf. í felag stovnað felagið Kaupthing Føroyar. Kaupthing Føroyar bjóðar fram tænastur innan handil og ráðgeving á virðisbrævamarknaðunum. Ætlanin er eisini at luttaka í uppbyggingini av einum føroyskum virðisbrævamarknaði og við tíðini luttaka í eini væntaðari privatiseringstilgongd í Føroyum.**

**Byggja upp nýggja vinnu**

Sum starvsfólk í Kaupthing Føroyar hevur tú møguleikan fyri at verða við til at byggja upp eina nýggja vinnu í Føroyum. Vit luttaka hvønn dag á altjóða fíggjarmarknaðunum innan handil og ráðgeving á lánsbræva- og partabrævamarknaðunum. Okkara kundar eru føroyskir stovnar, virkir og privatfólk.

Áhugin fyri hesum virksemi hevur síðan byrjanina verið sera stórur, og Kaupthing Føroyar er longu nú størsti útbjóðarin av hesum tænastum í Føroyum. Hetta merkir samstundis eisini, at okkum skjótast gjørligt tørvar fleiri fólk.

**Virðisbrævahandlari/ognarrøkil**

Áhugin at handla virðisbrøv í Føroyum er so stórur, at vit hava brúk fyri einum fólki til:

- Ráðgeving og handil av virðisbrøvum fyri privatar og vinnuligar kundar
- Uppsøkjandi sølu mótvegis størri kundum
- Røkt av verandi avtalum við kundar

Førleikakrøv

Tú skalt helst hava eina hægri búskaparliga útbúgving og hartil starvsroyndir innan virðisbrævaøki, men tað hevur størst týdning, at tú hevur:

- Royndir við kundarøkt
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

**Umsitingarleiðari**

Virksemi okkara er vorðið so umfatandi, at neyðugt er við einum ábyrgdarfólki at hava ábyrgdina av:

- Fíggjarstýring og roknskapi felagsins
- Uppbygging og viðlíkahaldi av mannagongdum
- Backoffice — t.e. avgreiðslu av virðisbrævahandlum
- Stýring av gjaldføri
- Felags við stjóran at hava ábyrgdina av umsiting felagsins annars

Førleikakrøv

Umsitingarleiðarin skal hava eina hóskandi útbúgving og hartil starvsroyndir, men tað hevur størst týdning, at tú hevur:

- Evnir at samskipa og raðfesta arbeiði
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

**Fólk til umsitingina**

Saman við umsitingarleiðaranum verða dagligu ábyrgdarøki tíni:

- Backoffice — t.e. avgreiðsla av virðisbrævahandlum
- Avgreiðsla av posti og telefon
- Stýring av gjaldføri
- Fyrisiting av bókhaldi felagsins

Førleikakrøv

- Skrivstovuútbúgving ella líknandi
- Verða vanur KT-nýtari
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

Øll størvini verða sett skjótast gjørligt. Fyri størvini verður lønin ásett eftir avtalu. Umsókn við prógvum, CV og hartilhoyrandi skjølum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 27. mai 2000. Umsóknirnar, sum verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

Kaupthing Føroyar
Postboks 3090
110 Tórshan
ella á e-mail: peter@kaupthing.com

Nærri upplýsingar fáast um størvini við at venda sær til Peter Holm á telefon 351500.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR
Postboks 3090 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com